# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gott fyri listina – gott fyri borgaran

Ásannast má, at Heðin Mortensen, býráðsformaður í Tórshavn er maður við mongum frískum og nýggjum hugskotum um menning og trivnað. Uppskot hansara um at býurin skuldi ogna sær Skeivapakkhús var eitt framúr gott hugskot, sum kundi elvt til eitt stórt framstig fyri mentanarlívið í Havn. Tað er tí mikið spell, at hetta frálíka hugskot varð forpurrað og munnu flestøll vera samd um, at henda gerð var stuttskygd og ivaleyst fer at koma aftur um brekkur.

Nú hevur so býráðsformaðurin gjørt av, at allir nýggir kommunalir nýbygningar skulu verða listarliga prýddir, og at ávís upphædd skal nýtast til hetta endamál. Hetta er eitt frálíkt hugskot, sum er vælkent uttanlands. Henda regla hevur verið galdandi í grannalondum okkara í áratíggjur og verið góð fyri myndlistina í viðkomandi londum. Tað er einki at ivast í, at verður hesin nýggi politikkur býráðsformansins rikin konsekvent, so fer hann at verða til mikið gagn fyri listafólk okkara. Men hesin politikkur fer eisini at gagna borgarunum. Tað er sunt og gott fyri fólk at hava nakað vakurt ella nakað listarliga avbjóðandi at hyggja at, og so eru listarliga prýddir almennir bygningar eitt prýði fyri býin uttan mun til, um listin er uttan- ella innanhalla.

Tað er umráðandi, at farið verður fram við skili, so at gott samanhang verður millum bygningar og listaverk. Ofta kemur fyri, at nýggir almennir bygningar verða prýddir innan við list, sum ikki er í samljóði við bygningin sjálvan. Her skal altso framyvir verða eitt samstarv millum arkitekt og listafólk. Tað eigur eisini í framtíð-ini at vera so, at fleiri listafólk eiga at fáa høvi at kappast um almennar uppgávur. Slíkar eiga at verða bjóðaðar út og tann, sum fær uppgávuna eigur so at samstarva við arkitekt og byggiharra. Nú hevur Havnin sum ikki einaferð víst vegin, nú er eftir at fáa landsmyndugleikarnar at vakna. Vónandi fáa vit eina skipan, ið tryggjar, at allar nýggir almennir bygningar verða prýddir við nýggjari føroyskari myndlist.

**Sosialurin**

## Jacob Vestergaard og ???, grovt embætismisbrúk vegna egið áhugamál?

**HØGNI MIKKELSEN**
Býráðslimur í Tórshavn



Tað er ótrúligt, hvat vit borgarar skulu verða vitni til. Um nakar heldur, at hetta hevur nakað við rationaliseringar at gera, so er tíð at vakna. Hetta fer at kosta skattgjaldarunum milliónа upphæddir, og so ikki fyri at tosa um ta vanvirðing, sum sjálvur Jacob Vestergaard vísir sínum egna stovni – ótrúligt!

Hví spyrja vit – er nakað at spara, er talan um økismenning o. s. fr.? Svarið er heilt einfalt, NEI! Tað rætta svarið er, at hetta er fyri egið áhugamál, og allarhelst fyri løgmann eisini, soleiðis at teir hava møguleika at blíva valdir (Jacob bleiv ikki valdur seinast), og at løgmaður kann blíva afturvaldur – sjálvandi í suðri - tí øll vita, at løgmaður hevði ikki blivið afturvaldur, um hann hevði stillað um norðan fyri Suðuroynna.

Eitt púra greitt tekin um hesa óskiljandi avgerð er millum annað tað, sum løgmaður segði Degi og Viku 1. mars – “tað er sjálvandi Jacob Vestergaard sum tekur tær neyðugu ráðgeving inn sum hann heldur verða neyðuga, fyri at taka avgerðina um at flyta stovnin” - og sum øllum kunnugt, so hevur als eingin ráðgeving ella meting verið yvirhøvur.

Og sum øll flest vita, so hevur sjálvt løgmaður minkandi undirtøku, umframt at Jacob Vestergaard als slett ikki kom inn á ting seinast, umframt er eisini vælhugsandi, at onkur rossahandil er farin fram, sum t. d., at Fólkaflokkurin fær sín vilja (flyta stovnin) og Javnaðarflokkurin fær undirtøku um at seta Kyotoumhvørvissáttmálan í verk. Tí so kunnu bæði løgmaður og Jacob vísa á, at teir hava framt okkurt í verki og tí eru verdir at verða afturvaldur. Borgarstjórin á Tvøroyri er vanur við at siga sína meining, og tað taki eg eisini hattin av fyri – hann segði – val er fyri framman, so skal tað egnast, so skal tað verða nú. Men enn einaferð, ótrúligt at skattgjaldarin skal gjalda milliónа upphæddir fyri teirra egið áhugamál sum er at blíva afturvaldir. Eg skilji eisini væl fólk, tá tey krevja, at Jacob skal verða koyrdur frá.

Víðari kann man spyrja hví, borgarstjórin í Havn tekur undir við at minka um aktivitetin í høvuðsstaðnum, ein skuldi trúð at hann skuldi virkað fyri at veksa um aktivitetin í sínari egnu kommunu, men nei, borgarstjórin hugsar, sum ikki einaferð, og sum hinir báðir, um sítt egna áhugamál, tí hann hevur ikki ráð til at verða óvinur við Javnaðarflokkin, tí hann er fyri kortum sloppin undir veingin hjá Javnaðarflokkinum.

Man kann fyri stuttleikar samanlíkna hetta sum at flutt stovnin til Danmarkar ella Ísland, har er eisini uml tveir tímar frá høvuðsstaðnum – ljóðar tað rationelt?

Hetta skal ikki skiljast sum eg havi nakað sum helst ímóti at arbeiði verða upprættað í Suðuroynni, tvørturímóti, men at avleiðingin skal verða milliónа upphæddir fyri skattgjaldarin, og so ikki fyri at tosa um starvsfólkini – tað kann eg ikki taka undir við! Hevði um ikki annað onkur rationalisering ligið í hesum, so hevði eg kunna tikið undir við hesum.

Hetta sum er farið fram er bara enn eitt dømi um, at landsins politikarar kunnu gera tað, sum fremur egið áhugamál, uttan at tað fær avleiðingar.

1. mars 2007

## Heldur missa trúvirði enn vald

**ANNITA Á FRIÐRIKSMØRK**



Eg eins og restin av Tjóðveldisflokkinum hava tikið undir við ætlanunum um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, og vit hava havt uppskot um hetta á tingi. Men tá tóku samgonguumboðini ikki undir við at flyta strandferðsluna til Suðuroyar. Meirilutin í vinnunevndini: Henrik Old, Alfred, Jørgen, Heðin og Gerhard, grundgóvu fyri síni mótstøðu soleiðis m.a. soleiðis: ”sambært upplýsingunum frá strandferðslustjóranum verða avleiðingarnar av at flyta funktiónir ella deildir hjá Strandferðsluni til Suðuroyar, at dupultfunktiónir skulu upprættast, og nýggj fólk sostatt skulu setast, heildaratlit hvørva, umframt at økta fjarstøðan merkir, at dagliga samskiftið og samstarvið við hini skipini, restina av Strandferðsluni og samstarvspartnarar verður nógv truplari og kostnaðarmiklari…”.

Soeiðis fullu grundgevingarnar hjá samgonguumboðunum í vinnunevndini, og so góður var viljin hjá vinnunevndarumboðunum tá, at ganga ynskinum og hugskotinum hjá Hergeiri Nielsen á møti. Hergeir hevur

*framhald á síðu 11*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.